

*Henda myndin er frá sama túrið: Trónd Juul, við síðuna av honum Mikal, longst til høgru eg sjálvur, og fremst á myndini Anne Marie, sum var kokkur við okkum*



*Hetta er skúrurin sum eg leigaði frá Karl Jespersen av Tvøroyri, sum liggur beint innan fyri Polar Oil. Undir teirri hvítu presending er ein stakkur av saltfiski. Uppi á takinum situr Símun Joensen av Tvøroyri og tekur sær av løttum*

máttu vit gera á hvørjum ári.

Hetta várið gjørdu vit eisini ein vatnbrunn tætt við skúrin. Hann bleiv stoyptur upp av betong. Frammanundan høvdu vit haft eina slangu liggjandi úr einari tjørn longur uppi. Hon lá undir einum lítlum hamara. Har lá ein kavafonn fyrst, tá ið vit komu yvir. Henda kavafonn tinaði so líðandi, so hvørt sum tað leið út á várið.

Soleiðis nørdist um vatnið í tjørnuni. Men so kundi tað knípa við vatni, tá ið tað leið út á summarið. Tí var tað, at vit gjørdu henda góða brunn. Hann høvdu vit altíð fullan at taka til.

## Fossurin úr fjørðinum

Hetta summarið vantaðu vit ein mann, tá ið vit fóru heimani frá. Vit fóru so suður í Fiskanes at fáa ein mann har at koma við okkum. Vit vóru í fylgi við pápa mínum, sum eisini vantaði fólk, og hann fór suður har í somu ørindum við báti sínum Magnus Heinason.

Tá ið vit komu suður í Fiskanes, vísti tað seg, at ein stórur partur av tí yngra fólkinum var inni í einum fjørði innan fyri bygdina.

Vit fingu so onkran mann til at koma inn hagar við okkum. Tá ið vit komu inn í móti munnanum á fjørðinum hugsaði eg, at her er bæði smalt og grunt.

Eg haldi, at rennan var ikki meira enn einar tríggjar bátslongdir breið. Hartil var grunt, og tað sást væl niður á botn. Innan fyri var fjørðurin eisini smalur men ógvuliga djúpur.

Tá ið vit komu inn var háflóð. Tað hugsaði eg ikki um, fyrr enn vit fóru út aftur. Vit høvdu bert steðgað har inni so leingi, tað tók okkum at tosa við fólk. So var farið út aftur. Báturin hjá pápa mínum sigldi undan, ein grønlendingur stýrdi.

Nú vit koma út í rennuna, fer tann fremri báturin at vísa seg beint á høvdið. Nú var tað farið at fjarða, meðan vit hava verið har inni. Tí rennur tað út sum í einum fossi í rennuni. Vit máttu koyra á motorin fyri at báturin skuldi hava róðurkraft.

Eg veit ikki, hvussu tað hevði verið vorið, um vit høvdu steðgað longur har inni. Hetta var ikki so løgið, tá ið hugsað verður, allur hesin stóri og djúpi fjørðurin, skuldi fyllast og tømast eftir seks tímum ígjøgnum hetta tronga og smala sund.

Tað varð so farið norður aftur í Føroyingahavnina, og har byrjaðu vit útróðurin eina viku av juni mánað. Nú kann hetta tykjast at vera long tíð, áðrenn byrjað bleiv.

Men tá høvdu vit ikki sama skúr ár um ár, og stundum máttu vit eisini byggja av nýggjum. Tí bleiv so nógv tilrigging næstan á hvørjum ári.

Tað var stórur munur á okkara umstøðum og hjá teimum, sum róðu út við bátunum hjá Nordafar.

Teir komu til somu barakk ár um ár, fóru niðan á sjómansheimið at fáa sær at eta og fingu fyltan matkassa við frá sjómansheiminum, tá ið teir fóru til útróðrar.

Var nakað í vegin við motori ella báti, so var bara talað á smiðjuna, so var tað orðnað. Annars var fiskur sjáldan at fáa fyrr enn komið var út í juni mánað. Eg visti, at tað kundi vera so sørt til fisk, at vit onkuntíð á veg suður í Fiskanes royndu stað úr stað uttan at fáa ein tann einasta fisk.

Men eftir einum degi kundi fiskur vera um allan grunnin. So knappliga kundi fiskur koma.

## Stríð um fiskaprís

Hetta summarið ætlaði Grønlandsfelagið at lække prísin við 10 oyrum fyri kilo. Hetta var nógv, sum prísurin var tá.

Hetta fekk ilt í teir útróðrarmenninar, sum áttu sínar egnu bátar, og sum avreiddu til virkið.

Tað bleiv kallað til fundar inni á sjómansheiminum, har allir møttu saman við nøkrum av teimum, sum róðu út við nordafarbátunum.

Á hesum fundinum bleiv so viðtikið at senda fjarrit heim, at um prísurin varð lækkaður, fóru allir privatbátarnir at salta sjálvir. Henda møguleika høvdu nordafarbátarnir ikki, teir vóru bundnir av Nordafar. Teir høvdu heldur ikki hølir at salta í. Men okkara krav bleiv so eftirlíkað, og tað hendi so ikki meira við hesum.

Tað viðraði stak væl hetta summarið. Vit høvdu ongan bakkdag fyrr enn tað kom út í august mánaði. Ólasøkudag høvdu vit 11.000 pund. Henda dagin vóru vit suðuri á Marrak, hagar tað tók tríggjar tímar at sigla.

Marrak lá inni á fastlandinum. Amerikanarnir høvdu ein flogvøll har. Her var ein ómetaliga stórur sandslætti og útfyri har, uttan fyri skerini, lá hendan fiskileiðin, sum vit kallaðu suðuri á Marrak. Ein oyggj lág eisini við ein boða har, og hon bleiv kallað amerikanaraoyggin. Eg haldi, at teir høvdu brúkt hendan bogan at sigla inn eftir.

Hetta summarið fingu vit 111 tons av ráfiski, og vit komu heim við Karin K. Vit vóru heima um 8. oktober.

Við vóru umframt meg sjálvan Mikal Tausen, Hans Hentze,



*Henda myndin er frá 1959, her liggur portugisiska skonnartin Santa Maria Magdalena, sum er farin á Stóraboða, suður úr Svartaskeri. Boðin fekk seinni navn eftir skipinum*



*Hettar er ein doria av Santa Maria Magdalena, portugisisku skonnartini, sum fór á tann sokallaða portugisaraboðan*



*Her liggur Bogi, framman fyri skúrinum hjá mær í Føroyingahavnini. Hetta er ein sunnudag, sum tað sæst á mynduni, tí báturin liggur fortoyaður í so góðum veðri*



*Her liggur Karin K. við bryggju á Nordafar. Lastin er tømd og aftast við borðendan situr ein maður og hugsar um støðuna*